Málstrikan
MÁLFELAGIÐ

## Eldtongin og grannatræið

Nú skriva øll ritgerðir. Alt verður kannað og beskrivað. Men eitt er, sum eingin torir at nerta við, og tað er, hvussu tað føroyska málið hevur broytt seg tey seinastu áratíggjuni. Ein ritgerðin kundi itið »Føroyskt 1945-2005«, ein onnur »Føroyskt mál 1965 til nú« osfr.

Men eingin ritgerð kemur.

Í staðin uppliva vit ein málsligan urtagarð, har nógv veksur vilt, meðan annað ber týðilig merkir av at vera plantað eftir ætlan.

Hvussu er so útslitið av hesi ætlan, hesari málsligu planleggingini? Er málið blivið eitt betri amboð, hvassari, fínari, melodiskari, neyvari? Nøkur dømir kunnu nevnast, sum peika á málbrúk, sum ikki er batnað. Dømini eru úr bløðum og útvarpi í apríl 2009:

- eldtongin
- grannatræið
- knúst kjálkabein

Fyrr vistu føroyingar, hvat ein klovi var – eisini eftir at teir svørtu komfýrarnir vóru kasseraðir. Um ikki annað so úr litteraturinum. Sum T. N. Djurhuus yrkti um Marin Malenu: hon klovan langaði mær...

Hesin vankunnleikin peikar á, at málið er blivið fátækari. Tað batar lítið, at føroysk blaðfólk duga at siga einskilja og gegnigur og Kili og kilskur, um tey ikki vita, hvat ein klovi er. Tað er sjálvsagt torført at meta um, hvussu nógv fátækari málið er blivið, men tað hevði borið til at gjørt eina uppteljing av normalføroyskum og syntetiskum føroyskum orðum í tekstum. Hevur ein tekstur eina yvirvág av prefabrikeraðum orðum, kann hann kallast vánaligur um ikki óføroyskur.

At kalla eitt granntræ fyri eitt grannatræ avdúkar nakað annað. Vit vita øll, hvat ein granni er. Fyrr høvdu vit grannastevnu, vit kundu vera ringir og góðir grannar, og onkur kundi vera so órímiligur – helst í bennivíni – at hann ikki var grannhavandi. At skora hatta –a- inn millum grann og træ er púra óneyðugt. Tað er vanligt í føroyskum, at vit seta stovn móti stovni: bilbukt, andnegl, knæskel.

Uppaftur ein onnur síða av málsligari armóð sæst í yvirskrivtini í blaðnum nú ein dagin: Knúst kjálkabein. Tá ið nakað er knúst, so er tað sorlað, í knasi. Tað, sum talan var um her, var helst, at ein ítróttarmaður hevði brotið kjálkabeinið, kanska bara brákað tað ella skeiklað tað, og tað kann sjálvsagt vera pínufult. Men at knúsa eitt bein er nakað annað. Her síggja vit ta síðuna av málneyðini, sum eitur stíl-allergi. Nógv av okkara blaðfólkum hava ongan stíl, síggja ikki nuancur, hjátýdningar og millumtýdningar. Tey halda, at málið hjá reinsifimum lærarum er nóg gott, men tað er tað ikki.

Eitt annað dømi: Fyrr kundu vit vera ring eftir verðini; vit kundu vera verðslig, og vit kundu halda okkum burtur frá verðins larmi, og vit kundu lesa verðinssøgu. Men nú siga orðabøkurnar, at alt skal eita – heims-: Vit hildu, at Nólsoyar Páll var ein sannur verðinsmaður, tí hann dugdi fremmand mál, men nú sigur orðabókin, at hann var ein heimsmaður...

Hetta er ein mekanisk orðaútskifting, sum einki hevur við filologi og lingvistikk at gera. Hevði Nólsoyar Páll vitað aftur í verðina!

Kanska skuldi Marin Malena tjóðrað slíkar málbeklarar til eitt grannatræ og givið teimum ein umgang við eldtongini – uttan at knúsa beinini á teimum, sjálvsagt.

## Um málstrikuna...

»Málstrikan« er ein klumma, sum fólkini aftan fyri Málfelagið skriva. Í nevndini í Málfelagnum sita Regin Eikhólm, André Niclasen og Dan R. Petersen.

Endamálið við hesum teigi er at birta viðkomandi kjak um málsligar spurningar og málslig sjónarmið.

Fólk eru vælkomin at senda viðmerkingar til »Málstrikuna« - og fólkini í Málfelagnum vilja eisini fegin svara spurningum.

Viðkomandi viðmerkingar og spurningar verða prentað á hesi síðu. *blaðstj.*



*Edward Fuglø, listamaður, og Jákup Simonsen, formaður í Listabólkinum hjá Tórshavnar Býráð, skrivaðu hósdagin undir avtaluna um, at listarmaðurin úr Klaksvík skal prýða nýggja skúlan við Løgmannabreyt í Hoyvík*

*Mynd: Birgir Kruse*

# Edward Fuglø prýðir skúlan við Løgmannabreyt

**Listabólkurin hjá Tórshavnar kommunu skrivaði í gjár undir sáttmála við listamannin Edward Fuglø um listprýði, sum er ein røð av vegmyndum í miðhøllini í nýggja skúlanum við Løgmannabreyt**

Edward Fuglø er fyrsta listafólkið, sum fer at arbeiða í einum almennum bygningi fyri Listabólkin hjá Tórshavnar kommunu.

Listaverkið, sum er ein myndrond kring miðhøllina í nýggja skúlanum, lýsir eina søgu um tann, ið fer út í stóru verð at søkja sær kunnleika og eydnu.

Myndrondin, sum í støðum er seks metrar høg, er gjørd úr ymsum tilfari, ið er fest á bróstið í stóru høllini. Fortíð, nútíð og framtíð verða sameind við verum úr fornum søgum og kvæðum, men eisini við antennum og robottum úr Star Wars.

## Fólk í Klaksvík og Leirvík síggja nú IKTUS

Nú sleppa fólk í Klaksvík og Leirvík at síggja sjónvarpsrásina IKTUS. Anja Hansen, stjóri á rásini sigur, at kanska fer eisini at bera til at síggja rásina á Kambsdali og parti av Fuglafirði.

Øll, sum hava digitalan móttakara (t.d. Televarpskassa) ella sjónvarp við digitalum móttakara, kunnu leita eftir IKTUS - og Anja minnir á, at fólk skulu




leita manuelt á kanal 31.

IKTUS sendir av Brúnaskarði á netinum hjá R2Net.

Menn hava í tveir dagar arbeitt við at seta sendara og antennur upp á Brúnaskarði, sum bæði senda yvir Klaksvík og móti Leirvík, og seinnapartin í gjár kom signal á.

- Eftir ætlan er Oyrnafjall á Suðuroynni næst, men ikki er heilt greitt enn, nær tað verður, sigur Anja Hansen.

## Várfest verður í Havn

Várfest, er heitið á einum nýggjum tiltaki, sum verður í miðbýnum í Havn sunnudagin 17. mai 2009. Byrjað verður kl. 15.00 og nógv spennandi er á skránni.

Tiltakið byrjar við livandi tónleiki á Vaglinum. Møguleiki verður hjá øllum, at uppliva fleiri av teimum fantastisku søgunum, sum eru í Bíbliuni. Hetta verður skipað sum ein ferð, sum fer fram í miðbýnum.

Byrjað verður á Vaglinum, og síðani verður farið runt til ymiskar spennandi postar. Her verður høvið at síggja nógvar, ymiskar, stuttar, samanhangandi leikir. Samstundis, verður møguleiki fyri at keypa sær okkurt til matna í einum hugnaligum umhvørvi, ímeðan klovnar vísa síni kynstur. Hetta verður allan dagin. Umframt hetta, verður ókeypis suppa á Vaglinum kl. 17.30.

Kl. 19.00 verður tónleikacafé, har ymiskt annað eisini verður á pallinum.

Seinni út á kvøldið, verður eitt ungdómstiltak í miðbýnum. Caféin verður framvegis opin, og fleiri tónleikabólkar fara at framføra.

Endamálið við tiltakinum, er at vísa familjunum ein kristindóm, sum bæði kann vera spennandi, avbjóðandi, hugtakandi og stuttligur. Vit vilja skapa eitt umhvørvi, har bíbilski boðskapurin verður boðaður á ein alternativan hátt, við drama og upplivilsum. Fyrireikararnir siga, at øll eru hjartaliga vælkomin.

Sosialurin